

Føroyskir og kinesiskur luttakari á skeiðnum um landgrunsrætt á Fróðskaparsetrinum í hesum døgum. Í kvøld verður alment fyrilestrarkvøld í Østrøm um oljuleiting og landgrunsrætt. Mynd Jan Müller

# Oljuleiting á føroyska landgrunninum í Østrøm í kvøld

**Jan Müller**

24.06.2014 - 13:46

Oljan.fo

Í sambandi við altjóða summarskeiðið SACS, sum í hesum døgum verður hildið á Fróðskaparsetri Føroya, verður skipað fyri einum almennum fyrilestrartiltaki týskvøldið 24. juni á Østrøm í Tórshavn.

Teir tríggir fyrilestrarnir, sum verða hildnir á enskum máli, lýsa ymisk viðurskifti í tilknýti til ráevni á og undir havbotninum á føroyskum og altjóða øki:

- Tetsuro Urabe, Japan, limur í landgrunsnevnd Sameindu Tjóða, greiðir frá um “Natural resources of the outer continental shelf”

- Harald Brekke, Noreg, limur í altjóða havbotnsmyndugleikanum hjá ST, heldur fyrilestur undir heitinum "The International Seabed Authority"
- Heri Ziska, deildarleiðari á kanningardeildini á Jarðfeingi, og Gareth Allinson, Senior-ráðgevi hjá Statoil Faroes, greiða frá um "Hydrocarbon exploration on the Faroese continental shelf"

Tiltakið á Østrøm byrjar kl. 19:00. Tað er ókeypis, og øll við áhuga í hesum evni eru hjartaliga vælkomin.